# Fer altíð eftir gullinum

*Ein ítróttarmaður, sum altíð ger sítt ítarsta, og sum aloftast røkkur sínum málum. Líkamikið um tað er fótbóltur, renning, bogaskjóting ella seyðahundar, sum kappast verður um*

**- Eg sigi ikki, at eg rokni við nøkrum gullmerkjum. Men eg taki lut í fýra kappingum, og sjálvandi royni eg eftir gullinum í teimum øllum, sigur Absalon Hansen, sum longu hevur tikið lut á fimm oyggjaleikum - í trimum ymsum kappingargreinum**

ÍTRÓTTAMAÐUR

*Jákup/Jens Kristian*



**Norröna:** - Eg hevði serstakliga góðar vónir til teir longru teinarnar, og tí var eg sera spentur upp á kappingina á 100 kilometrum. Eg lá eisini hampuliga væl fyri, tá bakhjólið brádliga punkteraði. Sum vant, so rætti eg høgra arm upp sum tekin um, hvat var hent, men har kom eingin hjálparbilur. Ikki fyrr enn eftir 10 minuttum kom bilurin fram, og tá var tað ikki ein gongd mítt hjól, sum hann hevði við sær, og so tímdi eg ikki meira. Eg tveitti súkkluna burtur, og tað var so endin á mínari súkklukarrieru.

Soleiðis greiðir Absalon Hansen frá einastu kappingargreinini, sum hann ikki hevur vunnið nakað heiðursmerki í, tá hann hevur tikið lut á oyggjaleikunum.

## Avboð til seyðahunda-EM

Tað telist helst millum tað heilt sjáldsama, tá íðkarar taka lut í fleiri ítróttargreinum á oyggjaleikunum, men Absalon Hansen er heldur ikki nakar heilt vanligur ítróttarmaður. Hann tók í árunum frá 1985 til 1989 lut í rennikappingunum á oyggjaleikunum, har hann í 1989 vann gull á marathon teininum. Í 1991 var hann partur av súkklulandsliðnum, har hann altso gavst eftir kiksaðu landavegssúkklingina, og í 1997 var tað so bogaskjóting, sum hevði fangað hansara áhuga. Ta ferðina gjørdist talan um silvlur í recurve, og hóast hann hevur gjørt minni við bogaskjótingina seinnu árini, so er hetta nú aftur ítróttin, sum satsað verður uppá.

Legg hartil, at hann hevur verið føroyameistari í fótbólti, er ein rættiliga habilur telvari, eins og hann í vár gjørdist nummar eitt, tvey og trý í seyðahundakapping. Eitt úrslit, sum annars kundi sent hann til EM-kappingina, men hendan verður hildin í somu døgum, sum oyggjaleikirnir, og tí vórðu avboð send til hetta.

## Bara seg sjálvan

Umframt at bera boð um serstakliga góð evnir, so siga úrslitini helst eisini, at talan er um ein ítróttamann við einum óvanliga seriøsum hugburði. Ein maður, sum ikki gevst, fyrr enn hann stendur á toppinum. Ella er tað nú so?

- Eg veit ikki, hvussu hart tú skalt siga, at eg ongantíð gevi upp. Men sjálvandi eru ambitiónirnar til staðar. Eg skal ikki siga, at eg rokni við nøkrum, men her á oyggjaleikunum taki eg lut í fýra kappingum, og sjálvandi fari eg at royna eftir gullinum í teimum øllum.

Tey sum kenna teg, siga teg vera ein typa, sum verður púrasta bitin av tí, sum tú tekst við. Er tað ikki ein eginleiki, sum er viðvirkandi til góðu úrslitini.

- Tað er tað kanska. Í øllum førum royni eg altíð at gera mítt ítarsta fyri at røkka úrslitunum. Eg veit, hvat krevst, um tú skalt verða bestur, og ongum nýtist at skumpa undir meg, fyri at fáa meg til venjingar. Tað er eisini tað, sum mær dámar so væl við slíkum ítróttargreinum. Tú hevur bara teg sjálvan at arbeiða við, og so er at gera tað arbeiðið ordiligt.

## Hugurin má vera har

Hesin hugburðurin var kanska eisini tað, sum veruliga fekk gongd á renningina hjá Absalon, áðrenn renning veruliga var vorðin ein ítróttargrein í Føroyum. Trupulleikar við rygginum fluttu hann tó yvir á súkkluna, og sjálvur heldur hann ikki, at munurin var tann heilt stóri í hesum.

- Eg var kanska eisini heppin, tí eg kom við í súkklingina, júst sum hon av álvara byrjaði. Tí var støðið ikki so øgiligt at byrja við, og eg var tí alla tíðina við millum teir bestu. Men eftir hendingina í '91 so tímdi eg ikki meira.

Eitt er renning og súkkling. Bogaskjóting er nakað heilt annað. Hvussu ólukkan bar tað til, at tú síðani fór ígongd við hetta.

- Tað er væl soleiðis, at allir dreingir halda tað vera stuttligt at skjóta til máls. Soleiðis hevði eg tað eisini sum smádrongur, og hetta er helst nakað, sum livir víðari. Í øllum førum varð eg alt fyri eitt freistaður, tá eg ta einu ferðina kom at práta við Schandorff um hetta, og so fór eg ígongd.

- Tað gjørdist so til silvur á Jersey í '97, men eftir hetta hvarv hugurin nakað. Og hendir tað, so nyttar tað í mínum hugaheimi einki at halda á fram.

## Ongar umberingar

Men nú er hugurin so aftur til staðar. Seinasta hálva árið hevur Absalon skotið at kalla hvønn dag. Úrslitini komu eisini aftur rættiliga skjótt, og so er spurningurin, hvørt hesi eru nóg góð til heiðursmerki enn einaferð. Kanska eitt gull, nú sekstan ár eftir, at gullið á marathon-teininum kom til høldar.

- Vit hava so fýra gullmerki at skjóta eftir. Og í so máta er tað stuttligt, at kappingin er broytt. Fyrr varð jú skotið yvir fýra dagar í tveimum FITA-rundum. Tá er skjótt, at onkur stingur avstað, og so kappast restin bara móti sær sjálvum. Við nýggju reglurnum er spenningurin nógv størri yvir allar dagarnar, sigur Absalon.

Og botn-seriøsi hugburðurin endurspeglast, tá tosað verður um umstøðurnar at skjóta í Hetlandi. Her hevur verið tosað um lýggja vindin, sum ofta kann snýta skjúttarnar, tí hesin ikki kennist á sama hátt, sum hann ger í Føroyum. Ein frágreiðing, sum toftamaðurin tó á ongan hátt hevur hug at keypa.

- Sjálvandi spæla veður og vindur inn, og ein og hvør skjútti skjýtur eisini best, um tað er blikalogn. Men tað nyttar lítið at gera hetta til eina umbering. Tað er nærum altíð ein spurningur um fyrireikingar, og so er spurningurin, um hesar hava verið nóg góðar.

## FAKTA

Skotið verður í recurve og compound. Í recurve er talan um meira traditonellar bogar, meðan compund er meira háteknologiskt, har meira teknisk útgerð er á bogunum.

Talan er fýra kappingar í ávíkavist recurve og compund. Einstaklingar og lið skjóta sonevndar FITA-rundur, har 36 pílar verða skotnir á ávíkavist 90, 70, 60 og 30 metrum. Hvørt liðið kann telja fýra menn og tvær kvinnur, men tað er bara úrslitið hjá bestu kvinnuni og tveimum teimum bestu monnunum, sum telir við. Síðani er talan um face-to-face kappingarnar, har talan er um munandi færri pílar, og har tað bara er vinnarin, sum fer víðari.

Føroyar hava vanliga staðið seg væl í bogaskjóting, har tað gjøgnum árini er vorðin talan um hópin av heiðursmerkjum. Ikki minst hevur Vang-húskið skotið seg langt upp. Schandorff hevur soleiðis 10 av 12 oyl-metum í compound hjá monnum, meðan Sigrid hevur 4 av 9 metum á kvinnusíðuni. Eisini dóttirin, Annika Vang, tykist hava góðan møguleika at gera um seg á leikunum hesaferð.

Umframt møguligan vind, verður mjørk sagdur at vera størsti trupulleikin hjá skjúttunum. Tað kann eisini vera trupult at skjóta neyvt til máls yvir 90 metrar, um tjúkkur mjørki liggur yvir oyggjarnar. Nakað, sum tey flestu halda kann vera til fyrimuns fyri Føroyar og Hetland, um veðrið háttar seg soleiðis.

**Føroyskir luttakarar**
**Compund, menn:** Per Holm Andersen, Jógvan Niclasen, Jóannes Poulsen og Schandorff Vang
**Compound, kvinnur:** Sigrid Vang
**Recurve, menn:** Absalon Hansen og Rógvi Mohr
**Recurve, kvinnur:** Rakul Dam og Annika Vang

**Luttakandi oyggjar:**
Áland, Bermuda, Føroyar, Guernsey, Isle og Man, Isle og Wight, Jersey, Orkney, Rhodos, Shetland og Ynos Mon